

*Vinnan í Føroyum vinnur, um Føroyar eru kendar kring heimin gjøgnum tónleikin, og um fólk vita, hvat landið stendur fyri, sigur Christer Lundblad frá Swedish Music Export*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Tit standa mát í altjóða høpi

**- Tað nógva av føroyska tónleikinum stendur væl mát í altjóða høpi. Ein partur av tónleikinum er kanska nakað lokalur, og tað verður trupult at útflyta henda tónleik. Men fleiri bólkar hava eitt høgt støði, sigur Christer Lundblad frá Swedish Music Export**

TÓNLEIKAVINNA
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Christer Lundblad umboðaði Swedish Music Export við Atlantic Music Event. Christer Lundblad sigur, at góðskan á tónleikin var á einum høgum støði.

- Eg haldi, at Makrel vóru sera góðir. Týr er sera gott, men ógvuliga sermerkt og kanska trupult at útflyta. Men Týr hevði eina sera góða framførslu. Fleiri aðrir bólkar vóru góðir eisini, sigur Christer Lundblad.

Høvðusendamálið við Atlantic Music Event er at geva føroyskum bólkum ein sýnisglugga út í altjóða tónleikavinnuna. Christer Lundblad heldur, at føroyingar mugu lata útlendingar lurta og hoyra á hesar ymsu bólkarnar, og fløgur mugu gevast út kring allan heimin fyri at skapa eitt grundalag fyri tónleikaútflutningi. Hann sigur, at føroysku bólkarnir mugu traðka fram á konsertum og festivalum kring heimin.

### Almennur stuðul má til

- Marknaðurin er so lítil í Føroyum, so tað kann gerast trupult at finna fíggjarliga stuðulin, soleiðis at tað kann bera seg. Tað skal nokk almennur stuðul til frá føroyska landsstýrinum. Tað er týdningarmikið at ganga saman. Til dømis kann mann satsa upp á nakrar fáar bólkar í eitt ár ella tvey, og tann vegin fáa teir bólkarnar fram, sum mann trýr uppá, sigur Christer Lundblad frá Swedish Music Export

### Latið fólk vita um Teit

- Tit føroyingar hava jú eitt altjóða frambrot í løtuni, nevniliga Teitur. Nú ræður um at hanga í. Latið fólk vita, at Teitur er úr Føroyum. Tann vegin kunnu tit vísa, hvat annað gott tit hava av tónleiki á hesum oyggjunum, sigur Christer Lundblad.

Um føroyingar skulu skulu fáa fleiri gjøgnumbrot á altjóða tónleikamarknaðinum, so er kravið váðafúsur kapitalur, heldur Christer Lundblad

- Váðafúsur kapitalur má finnast, um ein byrjan skal fáast á. Eg haldi, at almennir pengar skulu uppí. Tað er í lagi, at tað almenna stuðlar, tí tað snýr seg ikki bert um hesar bólkarnar, men tað snýr seg faktiskt meira um at seta Føroyar upp á kortið sum ein útflytari av tónleiki og sum ferðavinnumál. Vinnan í Føroyum vinnur, um Føroyar eru kendar kring heimin gjøgnum tónleikin, og um fólk vita, hvat landið stendur fyri. sigur Christer Lundblad.

Lundblad sigur, at hann arbeiðir í løtuni við at fáa føroyskar bólkar til Svøríkis. Hann vil ikki siga hvørjar bólkar.

## Vil ikki hava mainstream

**- Eg eri ikki so áhugaður í teimum, sum royna at vera mainstream. Eg vil hava tað, sum er serligt føroyskt, sigur Lárus Jóhannesson frá íslendska 12Tónar**

TÓNLEIKAVINNA
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Lárus Jóhannesson er maðurin í Íslandi, sum um nakar hevur ført Eivør Pálsdóttir fram. Hann stendur fyri plátufelagnum 12Tónar. 12Tónar gav út Krákuna við Eivør Pálsdóttir, sum seldi sera væl í Íslandi, og var tað um hetta mundið, at Eivør fekk sítt veruliga gjøgnumbrot í Íslandi.

Lárus Jóhannesson frá 12Tónar var í Føroyum í vikuskiftinum, tá Atlantic Music Event var í Norðurlandahúsinum. Hann hugdi eftir nýggjum talentum.

- Eg leiti fyrst og fremst eftir tí, sum er sermerkt; tónleik sum tú ikki hoyrir aðrastaðni. Eg hyggi eisini eftir einstaklingum, sum eru evnaríkir, sigur Lárus Jóhannesson.

- Tað eru nøkur ting, sum eg eri áhugaður í, og eg vil royna at fáa onkrar bólkar til Íslands at spæla, sigur Lárus Jóhannesson, sum ikki vil siga hvørjar bólkar talan er um.

Lárus Jóhannesson sigur, at hann er vælnøgdur við Atlantic Music Event, sum hann helt varð væl fyriskipað.

- Tað hevur verið eitt hugnaligt vikuskiftið fyri meg, sigur Lárus Jóhannesson frá 12Tónar.